# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Carl Gustav kongur hevur ikki orðið í sínari makt, men eg havi stóra virðing fyri honum*

*(Göran Persson)*

# Hevur fingið innferðarloyvi til USA

**Amerikonsku myndugleikarnir hava givið iranska forsetanum, Mahmoud Ahmadinejad, loyvi at koma á fund í ST**



*Iranski forsetin Mahmoud Ahmadinejad.*

Iranski forsetin verður ikki einsamallur á ferðini, tí sambært uttanríkisráðnum í Washington hava 13 iranskir embætismenn og 26 trygdarmenn eisini fingið innferðarloyvi. Harafturat hevur Iran biðið amerikonsku myndugleikarnar um innferðarloyvi til 33 fólk, sum manna flogfarið, ið skal flyta forsetan til New York.

USA og Iran hava ikki havt diplomatiskt samband síðani kollveltingina í Iran í 1979, og viðurskiftini millum Washington og Teheran hava sjáldan verið so spent sum júst nú orsakað av stríðnum um iransku kjarnorkuætlaninar.

Iran sýtir fyri at slaka í stríðnum um kjarnorkuna, og teir næstu dagarnar skal trygdarráðið hjá ST umrøða, hvørji stig skulu takast ímóti landinum. Mahmoud Ahmadinejad, forseti, hevur biðið um loyvi at lýsa iransku sjónarmiðini fyri trygdarráðnum, og tað er í hesum ørindum, at hann hevur fingið innferðarloyvi til USA.

Talsmaðurin hjá amerikanska uttanríkisráðnum, Sean McCormack, segði í gjár, at amerikanska stjórnin heitir inniliga á iranska forsetan um at nýta hetta høvið til at ganga undir treytirnar hjá ST fyri at sleppa undan tiltøkum.

# 200.000 evropear vita ikki at tey hava HIV

**740.000 fólk í Vestur- og Miðevropa eru HIV-smittað, men triði hvør veit ikki av tí**

- Umleið 30 prosent av teimum umleið 740.000 ES-borgarunum, sum hava smittuna í sær, vita tað als ikki. Tí er vandi fyri, at tey fara at smitta onnur, og tað er helst hendan vantandi vitanin, sum ger, at HIV framvegis breiðir seg, sigur leiðarin á evropeiska smittustovninum, Zsuzaanna Jakob, við Politiken.

Á einari HIV-ráðstevnu í týska býnum Bremen í síðstu viku segði týski kanslarin, Angela Merkel, at hon fer at taka trupulleikarnar við HIV upp á ES-toppfundinum, sum verður í juni.

Serfrøðingar siga, at framstig í bardaganum ímóti HIV og eyðkvæmi hava gjørt, at færri doyggja av sjúkuni nú enn fyrr, men at hendan gongdin samstundis er vorðin ein koddi, soleiðis at sjúkan verður ikki tikin í sama álvara longur.

- At ein triðingur av teimum smittaðu als ikki vita, at tey hava smittuna í sær, er sera álvarssamt, sigur danski læknin Jan Fouchard, sum var millum luttakararnar á ráðstevnuni í Bremen.




*Angela Merkel: -Nú skal HIV-trupulleikin á dagsskránna hjá ES-leiðarunum.*

## Kríggið var eitt mistak

Nú fýra ár eru liðin, síðani kríggið í Irak byrjaði, eru bretar framvegis líka sannførdir um, at tað var eitt mitak at leypa á Irak.

Í hvussu er vísir ein meiningakanning hjá BBC, at 60 prosent av teimum spurdu eru sannførd um, at tað var eitt mistak at leypa á Irak fyri fýra árum síðani. 30 prosent halda, at tað var í lagi, og tey seinastu 10 prosentini vita ikki.

Kanningin vísir, at flestu bretar eru til reiðar at styðja bretskar hermenn, sum fara av landinum í neyðhjálparørindum ella fyri at forða fólkadrápi. Í slíkum førum eru 57 prosent til reiðar at stuðla hermonnunum.

## STUTT SAGT

### Korini vorðin verri

Næsta vikuskiftið eru 50 ár liðin, síðani grundarlagið varð lagt undir tað, sum vit í dag kenna sum ES, og tí man tað vera hugstoytt hjá ES-leiðarunum at frætta, at fólk halda seg hava tað verri nú, enn tá felagsskapurin bleiv skipaður. Tað vísir í hvussu er ein kanning, sum er gjørd í teimum stóru limalondunum Bretlandi, Fraklandi, Týsklandi, Italia og Spania. Har siga 44 prosent av teimum spurdu, at umstøðurnar eru versnaðar, og 25 prosent halda, at korini eru batnað. Leiðararnir kunnu kortini ugga seg við, at bara 22 prosent halda, at tey høvdu fingið tað betri, um teirra land fór burtur úr ES, og 40 prosent siga, at tað hevði gjørt viðurskiftini uppaftur verri.

### Rýmdi á dyr

Russiski ST-sendiharrin, Vitalij Tsjurkin, var so misnøgdur við eina røðu, sum serligi ST-sendimaðurin í Kosovo helt á fundi í trygdarráðnum í gjár, at hann rýmdi á dyr. Aftaná segði Vitalij Tsjurkin, at sendimaðurin, Joachim Rucker, hevði verið stak ósakligur, og at hann hevði ikki lýst allar partar av málinum. ST hevur fyrr skotið upp, at Kosovo skal fáa størri sjálvræði, men Russland krevur, at tað skal gerast í sameáð við serbar. Russiska stjórnin hevur skotið upp, at finski semingsmaðurin Martti Ahtisaari skal halda fram við tingingunum við serbarnar og albanararnar í Kosovo, men Ahtisaari sigur, at tað er nyttuleyst.

### Vorðið sum fongur

Løgreglan í Panama hevur funnið 21,4 tons av rúsevninum kokaini umborð á einum skipi, sum varð tikið úti fyri kyrrahavsstrondini, har tað fekk boð um at sigla til lands. Skipið varð tikið sunnudagin eftir samstarv millum myndugleikarnar í Panama og amerikonsku rúsevnaløgregluna. Tólv mans vóru við skipinum, og teir eru allir tiknir og settir í varðhald. Skipið sigldi undir Panama-flaggi, og sum skilst vóru fleiri av manningini úr Panama og Meksiko. Myndugleikarnir ivast ikki í, at rúsevnið stavar úr Kolombia og skuldi á amerikanska marknaðin.